

## Seta Suðuroynna í fokus

– Fríggjakvøldið komandi klokkan 21 skipa politisku ungmannafeløgini fyri einum spennandi tiltaki á Seglloftinum á Tvøroyri. Á skránni verður feitasti tónleikabólkur í løtuni, »Gipsy Train«, siga politisku ungmannafeløgini.

– Vit siga, hvørji vit eru, hava eina øðrvísi quiz, og vit kjakast. Tiltakið er skipað av ungum, sum vilja gera ein mun, og tað er fyri øll, sum vilja vita meira um, hvussu vit kunnu taka lut í samfelagnum. Komið við til tiltakið, sum er øðrvísi, ókeypis og spennandi, siga PolUng.

## Skrásetið flytifugl

Náttúrugripasavnið heitir á fólk, sum longu nú síggja tjøldur og annan flytifugl, um at boða frá. Nú er tíðin, tá flytifuglur byrjar at koma til landið.

Leygardagin 5. februar, ein góðan mánaða fyri grækarismessu, varð fyrsta tjaldrið í ár skrásett. Tað var Elin Henriksen, sum skrivaði inn til okkum, at hon hevði sæð eitt einsamalt tjaldur niðri á bakkanum einastaðni í millum Kolbanargjógv og Morskranes. Hetta var á sama staði, sum tey fyrstu tjøldrini har á leið plaga at seta seg, tá tey eru komin til landið.

Talan er mest sannlíkt um eitt tjaldur, sum hevur verið í Føroyum ígjøgnum veturin, tí vanliga ferðast tjøldur og fuglur sum heild landana millum í flokki. Men tað er als ikki útilokað, at hetta tjaldrið hevur ferðast einsamalt allan tann langa veg yvir atlantshavið.





ÚTBÚGVING

*Altjóða skrivstovan fer at kunna og vegleiða um KOT-umsóknarblaðið. Holger Arnbjerg er leiðari á Altjóða Skrivstovuni*

# Útbúgvingarkvøld á Kambsdali

**Eirikur Lindenskov**

Í kvøld verður fjølbroytt kunningartiltak á miðnámsskúlunum á Kambsdali. Kunnað verður um miðnámsútbúgvingar, hægri útbúgvingar og ALS-skeið. Tiltakið er úrslit av samstarvi millum Altjóða skrivstovuna, miðnámsskúlarnar á Kambsdali og Arbeiðsloysisskipanina.

15. mars er seinasta freist at søkja um upptøku á miðnámsskúla í summar. 15. mars er eisini seinasta freist at søkja inn á danska lærustovnar umvegis kvotu 2. Í hesum sambandi hava Altjóða skrivstovan og miðnámsskúlarnir á Kambsdali tikið stig til eitt kunningarkvøld.

Altjóða skrivstovan fer at kunna og vegleiða um KOT-umsóknarblaðið og kvotu 2, og Handilsskúlin og Studentaskúlin fara at kunna um útbúgvingarnar FHS, HH, Student og HF. Harumframt fer ALS at kunna um hvørji tilboð og skeiðsmøguleikar eru til arbeiðsleys. Tiltakið byrjar klokkan 19 og fer fram á Handilsskúlanum á Kambsdali.



*Ein tingmaður úr Viðareiði fær 81.000 krónur um árið í »kostnaðarendurgjaldi«. Eitt vanligt fólk av Viðareiði, sum ferðast til Havnar at arbeiða hvønn dag, fær 13.000 krónur í endurgjald.*

*Bergur A. Dalsgarð, Sosialistiskt Ung*

# Rætt-vísandi rokn-skapir

Tað eru fleiri feilir í roknskapum, ið ikki eru grannskoðaðir, enn í roknskapum, har grannskoðari hevur kannað tølini. Tað skrivar Business-Line á www. bl.fo. Men munurin er lítil, staðfestir frágreiðing hjá donsku partafelagsskrásetingini.

Tað eru nú 5 ár síðani, at smærri donsk partafeløg kundu fráveija grannskoðan av sínum ársroknskapum. Í hesum sambandi hevur danska Erhvervs- og Selskabsstyrelsen kannað, hvørjar avleiðingar hetta hevur havt fyri innsendu roknskapirnar.

Niðurstøðan er tann, at tað fyrikoma heldur fleiri feilir í roknskum, har grannskoðanin er vald frá, í mun til teir roknskapir, har grannskoðari hevur kannað tølini.

Talan er ikki um feilir, ið ávirkað rættvísandi myndina sum so. Feløg sum hava frávalt grannskoðan hava bert 5% fleiri feilir enn tey feløg, ið av fríum vilja lata sín roknskap grannskoða, sigur Niels Henrik Englev, varastjóri í Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, m. a. í viðmerking til frágreiðingina.

Føroysk partafeløg standa eisini í boði at frávelja grannskoðan, um tey lúka ávísar treytir.



PENINGAGÁVA

*Í morgin klokkan 16 fara tónleikarar at handa Saltsiloverkætlanini stóra peningagávu*

# Salt siloin fær stóra peninga-gávu

### GÁVA Í morgin fara tónleikarar at handa Saltsiloverkætlanini í Suðuroyar stóra peningagavu

**Eirikur Lindenskov**

Handinin verður í Miðlahúsinum klokkan 16.

Tiltakið, sum er ókeypis, varar í ein tíma og verður sent beinleiðis á Rás2. Fyrireikararnir siga, at øll eru hjartaliga vælkomin í Miðlahúsið til tiltaki.

**Skráin sær soleiðis út:**

1. Kristian Holbæk bjóðar væl komin
2. Eyðun Nólsøe syngur eitt lag
3. Siloin er á grønu bylgjuni og dúvar upp á sjóorku. Árni Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingur, hugleiðir um hesa slóðbrótandi orkukeldu
4. Tróndur Enni og Lív Næs framføra eitt lag
5. Sunnleif Rasmussen hugleiðir um akustiskar avbjóðingar hjá einum nútímans tónleikahúsi
6. Jens Marni Hansen syngur eitt lag
7. Gávuhandan og takkartala. Kim Hansen og Ólavur Rasmussen
8. Havnar Hornorkestur spælir ein góðan march